# Kekklisti fyri køksliðini

**Uppseting leygardag í Hoyvíkar skúla**

- Fyll vatnkókaran – 10 litur (set stikkið í avbrótaran við teldurnar)
- Fyll kaffimaskinu til 110 koppar, kaffifiltur og 1½ pk. (750 g) kaffi + 1/2 maskinu afturat (set stikkið í avbrótaran, sum er við vaskið)
- Einnýtiskoppar – á hvørja síðu á 2 ella 3 borðum, eftir tørvi + eyka bikør til saft
- 1 ílat við teskeiðum á hvørt borð
- 1 ílat við sukurmolum á hvørt borð
- Einnýtistallerkar
- Serviettar
- Ruskílat við hvørt borð
- Kannað eftir, at handkløð, sápa og toiletpappír er á vesunum (fæst í skolirúminum)
- Dekkast skal bert upp í gongini har sum køkurin er

**Vatnkókari og kaffimaskina mugu ikki setast til somu el-gruppu!**

Tað, sum stendur í skúlastovuni leygardag og verður flutt, skal setast á sama stað eftir møtið sunnudag.

**Sunnumorgun í Hoyvíkar skúla**

- Tendra vatnkókara og kaffimaskinu seinast kl. 10:15
- Blanda saft í kannur og karaflar
- Sker køkurnar – legg á føt
- 4 pk. av mjólk (tann, sum hevur ábyrgd av liðinum, syrgir fyri, at mjólk verður keypt)
- fyll termokannur við kaffi og termokannur við te (3 teposar í hvørja kannu – lat standa eina løtu áðrenn posarnir verða tiknir úr, beint áðrenn bjóðað verður til drekka).
- Fyll 2 termokannir við kókaðum vatni.

Ansið eftir, at saft, mjólk, te, kaffi og køka er á borðinum – fyllið upp tað, sum manglar.

Síðan verður ruddað aftur. Mælt verður til, at sum mest verður ruddað av borðinum, áðrenn tilbiðjanarmøtið byrjar. Alt skal pakkast niður í kurvarnar, sum tað var í. Tann, sum hevur ábyrgd av liðinum skipar fyri, at viskistykkir, borðlappar og tvøgur verða tikin heim við at vaska.

**Minst til, at hava tað við aftur næsta sunnumorgun, sum er vaskað!**

**Viðvíkjandi baking:**
7 skuffukøkur mugu vera til hvønn sunnudag. Við tær, sum baka, skal sigast, at til tað, sum bakað verður má ið hvussu er verða brúkt umleið 500 g av mjøli, um tað so verður skuffukøka, formakøka, vaflur ella annað.

**Ungdómsmøti**

Tá ungdómsmøti er leygarkvøld, verður sett fram leygardag sum vanligt av ábyrgdarpersóninum og tann sum ger drekka til ungdómsmøtið, ger alt klárt aftur til sunnumorgun.

**Reingerð**

Øll rúm, sum verða nýtt, verða dustsúgvað ella vaskað eftir tørvi, sum mett verður um.

Ruskspannirnar í rúmunum skulu tømast og nýggir posar setast í spannina. Posarnir liggja á vaskivogninum í vaskirúminum.

Hygg eftir at einki skrell er eftir okkum í høllini.

Í vaskirúminum eru vaskiklútar og sápa til at vaska toilettini við. Handkløðini á toilettunum skulu skiftast. Hesi liggja eisini í vaskirúminum. Tey skitnu handkløðini og vaskiklútarnir verða hongd á eina skititoyskurv í vaskirúminum.

Dustsúgvast skal eisini har, sum sunnudagsskúlin samlast

Um gólv skal vaskast, verður blandaður lútur fyltur í spannirnar úr eini hvítari slangu, sum hongur á vegginum við vaskið í vaskirúminum. Tvøgurnar liggja í vaskirúminum og eftir nýtslu verða tær hongdar á skititoyskurvina í vaskirúminum.

Ansið eftir, at alt verður sett rætt aftur á vaskivognarnar og at vognarnir verða settir á sama stað í vaskirúminum. Farið væl um vaskirúmið.